StÍF-Neistin 30-28 (15-12):

# Hondbóltur á la Hitchcock




*Costin Dumitrescu kundi aftur í ár gera ein roynd at bróta takið á høllini, tá hann annað árið á rað hevði vunnið Cocaø-Cola kappingina*
*Mynd frá steypafinaluni: Álvur Haraldsen*

**Steypafinalan í manshondbólti gjørdist ein sannur gysari. Við tveimum framúrskarandi málverjaavrikum og stórum einsmansavrikum vórðu áskoðararnir mest sum sleptir upp á fjall, og so gjørdi tað minni, at samlaða leikliga dygdin onkun tíð hevur verið betri**

COCA-COLA FINALAN – MENN
*Jákup Mørk*

Tá alt var liðugt, hevði StÍF annað árið á rað vunnið Coca-Cola kappingina hjá monnum. Somikið stutt er niðurstøðan eftir finaluna, men áðrenn hendan staðfestingin var veruleiki, høvdu mongu áskoðararnir verið vitni til ein sera spennandi og undirhaldandi hondbóltsdyst.

## Neistin skúmaði fyrst

Tað var kanska Neistin, sum fekk tað betru byrjanina. 3-2-1 verjan tóktist at rigga frá fyrsta bríksli, og í hinum endanum hevði StÍF fyrstu løtuna sera ilt við at fáa fatur á neistamonnunum, har ikki minst Hans Áki tóktist væl upplagdur hesa løtuna.

Tað gekk tó ikki so long tíð, áðrenn steypavinnararnir frá í fjør fingu tak tak á. Ikki minst var tað ein stór hjálp, at Marian Cirloganesu togaði tvær brotskastsbjarginar umframt onkra aðra fram, soleiðis at StÍF einar tvær ferðir kundi revsa Neistan fyri ikki at skora.

Teir fingu eisini eitt veruligt tak á álopsmonnunum hjá Neistanum. Jacob Jónsson skaraði kanska framúr hjá Neistanum, men at bæði Áki Mørk og Heini Joensen vórðu hildnir í sera stuttum tjóðri gjørdi so avgjørt sítt til, at StÍF spakuliga tók at draga frá.

At Neistin so kortini hekk fast, komst serliga av Jacob, ið sum nevnt skaraði framúr. Fyrstu ferð atkvøðugreiðsla varð greidd her í Føroyum, varð íslendingurin kosin at vera ársins leikari, og verður hetta støðið framyvir, er hann í øllum førum eitt upplagt evni til sama heitið í ár. Bæði við skotum, gjøgnumbrotum og fríspælingum var hann alla tíðina ein støðug hóttan, og um nakað skulu strandingar vera fegnir um, at fríspælingarnar ikki altíð fingu ta viðferð, sum tær høvdu uppiborið.

## Skiftandi

Ivaleyst var steðgurin kærkomin hjá Neistanum, sum um tað mundi var um at missa takið á dystinum, men fyrstu løtuna í seinna hálvleiki tóktist tað ikki, sum um teir vóru førir fyri at broyta nakað.

Strandingar settu fulla ferð á, og við Costin Dumitrescu á odda varð leiðslan mest sum alt fyri eitt økt í fimm mál. Tað kundi líkst eini avgerð, men tað var tað tó ikki. Langt ífrá.

Neistin hevði nú sett Petur Magnusson í málið, og hann fór at herma eftir starvsfelaganum hinu megin við at fremja hópin av góðum bjargingum. Samstundis royndi Neistin skiftandi at taka Costin og Artur burtur úr spælinum, og nú fóru veruliga at minka.

Eitt skifti var støðan 22-21, og tá Marius Joensen samstundis fekk eina útvísing, hevði Neistin brádliga betru kortini, men teir tóku ikki av . Líka mikið um talan var um brotskast ella menn komu leysir, so helt Marian alla tíðina strandingum á odda, og so dragnði aftur.

Munurin gjørdist tó onggan tíð stórur, tað sum eftir var av dystinum. Serstakliga var tað nú John Petersen, sum gjørdi um seg á neistaliðnum .Eins og hann ikki vildi vera við undirlutan móti fyrrverandi liðfeløgunum. Heilt spennandi gjørdist tað seinastu tveir minuttirnar ella so.

Í eini roynd at skapa ófrið á hjá strandingum, sendi Dia Midjord mest sum alt fólkið út á vøllin at taka vandamestu skjúttarnar hjá StÍF úr dystinum.

Ta var tó ikki íroknað, at StÍF hevði enn ein stórskjútta á liðnum. Blaðungi Sveinur Justinussen hevur í øllum førum geninini í lagi, tá skjótast skal útifrá, og hetta prógvaði hann eisini, tá hálvur annar miunuttur var eftir at leika. Standandi á tríggja metrinum høgdi hann til, og uttan nakran sum helst møguleika hjá Peturi, kleindist bólturin í handara horn.

Hetta broytti støðuna til 29-26, og hóast tað framvegis var góður minuttur eftir, so stóð nú øllum greitt, at StÍF aftur í hevði fnnið steypakappingina.

## Málverjin og teir ungu

Skal takast samanum sigurin hjá strandingum, so var mest týðandi liðurin uttan iva framúrskarandi málverjaspælið hjá Marian. Til tíðir líktist hann einum livandi veggi, sum hann tók sær av øllum, og ikki minst var tað nærum stuttligt at síggja, tá hann í ovfarakæti yvir enn eina bjarging tveitti bóltin beint til neistaleikara – bert fyri at fremja enn eina stórbjarging.

Í álopsspælinum gekk nógv sum vant kring hendurnar á Costin Dumitrescu, men tað er sjónligt, at hansara lutur er heldur meira avmarkaður nú, enn hann hevur verið, og var tað ikki so, kundi úrslitið av dystinum lættliga verið eitt annað.

Tað var nevnliga í seinastu avgerandi løtunum, at leikarar, sum vanliga standa í bakgrundini, vórðu noyddir at taka yvir, og tað skal verða lagt afturat, at tað gjørdu teir eisini.

Marius, Sveinur og Bent sýndu allir, at verður ikki ansað eftir teimum, so kunnu teir meira enn so gera um seg, og at seks tey seinastu málini hjá stÍF vórðu skotin av hesum leikarum, sigur helst nakað um, hvussu stóran týdning breiddin á liðnum hevði leygardagin.

Hvussu var og ikki, so er niðurstøðan framvegis hin sama, sum hon var, tá greinin byrjaði. Strandingar eru steypavinnarar, og tað kann eisini leggjast afturat, at hetta var fult uppiborið.




*Í seinna hálvleiki stóð Petur Magnusseon framúrskarandi, og átti hann stóran lut í heiðrinum fyri, at dysturin aftur gjørdist spennandi*

### Dysturin í tølum

**StÍF-Neistin 30-28 (15-12):**

Støður í dystinum: 4-7, 8-10, 15-12, 18-13, 23,-21, 30-28

Málskjúttar:

StÍF: Artur Johansen 8(4), Costin Dumitrescu 7, Sveinur Justinussen 6, Bent Djurhuus 3, Marius Joensen 2, Andre F. Danielsen 2, Jón Rasmussen 1, Janus Trygvason 1

Neistin: John PEtersen 9(1), Jacob Jónsson 7, Heini Joensen 5, Hans Áki Dal-Christiansen 5, Áki Mørk 2

Brotskøst; StÍF 5, Neistin 4

Útvísingar: StÍF 6, Neistin 4

Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum. Sýndu alla tíðina gott yvirblikk og tóktust hava tamarhald á støðuni, hóast tað mangan mundi standa nógv við øllum ganginum, sum var í høllini.

# Háfjalssól

**Veteranurin hjá StÍF var sum vera man fegin um úrslitið, og ikki minst frøddi tað hann, at teir ungu høvdu tikið so nógva ábyrgd á seg**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Ein av royndastu monnunum hjá StÍF er uttan iva Artur Johansen. Tá vit eftir dystin spurdu hann, hvørt tað lá nakar loynidómur í, hvussu teir fyrireikaðu seg til slíkar dystir helt hann, at tað var tað nokk ikki.

- Eg haldi, at sjónvarpið hevur sítt at siga. Næstan allir hesir ungu menninir hava nú tikið sól, síðani vit tryggjaðu okkum finalusessin, tí teir vildu síggja gott út á skíggjanum. Tað er so í øllum førum eitt slag av motivatión, heldur hann skemtandi fyri,

Um dystin sjálvan helt Artur annars, at tað vóru teir ungu menninir, sum tryggjaðu StÍF sigurin.

Bæði Costin og eg vóru fullkomuliga lúgvaðir seinastu løtuna, og tí haldi eg, at tað var eitt stórt mistak, at fara út at mansverja okkum seinastu løtuna. Tað gjørdi bara, at vit fingu eitt sindur av luft, og tá teir ungu so fingu betri pláss, tóku teir alt fyri ábyrgd. Ikki minst Sveinur, sum avger dystin við teimum báðum seinastu málunum.



*- Næstan allir hesir ungu menninir hava nú tikið sól, síðani vit tryggjaðu okkum finalusessin, sigur Artur um, hvussu strandingar hava fyrireikað seg til finaluna*

# Tapti móti sínum egnu

**Tað eydnaðist ikki John Petersen at basa sínum egnu, og ivaleyst fer hann at fáa okkurt skotið frá skálafólki komandi tíðina**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Tá StÍF í fjør vann steypakappingina, var ein av týdningarmestu leikarunum í dystinum John Petersen. Í ár var tað tó við Neistanum, at John royndi seg í finaluni, og eftir dystin var tað sum vera man eitt sindur av speisemi við, tá vit spurdu hann, um avgerðin at skifta felag hevði verið hin rætta.

- Um tú hugsar um, hvør vann dystin, so spældi eg sjálvandi á skeiva liðnum í dag, men tað má mann so bara taka við, helt hann.

Men hvat er tað so, sum ger, at StÍF mest sum altíð reisir seg, tá týdningurin av dystinum er størstur?

- Nú havi eg bæði tapt og vunnið steypafinalu við StÍF, so tað er ikki altíð at teir vinna, men teir duga væl at seta seg upp til slíkar dystir. Liðið telir eisini fleiri heilt góðar spælarar, og tá vit royndu at taka teir royndu út, vóru teir ungu til reiðar at taka vyir. Og so skal heldur ikki gloymast, at málverjin hjá teimum stóð seg ótrúliga væl.



*- Um tú hugsar um, hvør vann dystin, so spældi eg sjálvandi á skeiva liðnum í dag, men tað má mann so bara taka við, helt John eftir dystin*

## Okkurt skotið

Tá vit síðani spurdu John, hvørt tað nú fór at ganga lang tíð, áðrenn hann aftur fer inn á Skála, segði hann, at tað mundi ikki fara at bila.

- Tað hevði kanska verið verri, um støðan var hin øvugta. Tá hevði onkur helst verið illur. Nú verður tað meira soleiðis, at eg fari at fáa nøkur skot, men tað má so vera tað. Kanska skuldi eg fingið mær dult telefonnummar, um telefonin fer at kima ov nógv, sigur hann enda, eitt sindur hugsunarsamur.

Ein av mongu vinmonnunum hjá John Petersen í StÍF er liðskiparin, Jón Rasmussen, og sjálvsagt ætlaði hann at lata okkurt skotið av móti vinmanninum komandi dagarnar.

- Tað er so heilt víst, at hann kemur at hoyra okkurt, men tað hoyrir við til søguna, at tað var lika við, at hann avgjørdi alt sjálvur ta einu løtuna.

Spurdur, um hann hesa løtuna hugsaði um, at kanska skuldi júst John avgera alt, segði Jón, at tað gjørdi hann sum so ikki.

- Men tað stóð heilt nógv á hjá okkum, og dysturin kundi so avgjørt farið báðar vegir. Vit vóru tó kanska eitt lítið sindur meira ágangandi, og hetta – saman við avrikinum hjá teimum yngstu á liðnum – gjørdi, at vit hóast alt fingu sigurin.



*- Tað er so heilt víst, at hann kemur at hoyra okkurt, men tað hoyrir við til søguna, at tað var lika við, at hann avgjørdi alt sjálvur ta einu løtuna, helt Jón Rasmussen um tað at spæla ímóti John Petersen*

# Halda høvdið kalt

**Hjálparvenjarin hjá StÍF helt eftir dystin, at tað var av avgerandi týdningi, at leikararnir hildu høvdið kalt, tá nógv stóð á**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Hjálparvenjari – onkur kallar tað sálarligi ráðgevin – hjá StÍF hevur seinastu dystirnar verið Sveinbjørn Poulsen, sum annars hevur drúgvar royndir frá hondbóltsspælinum.

Eftir at hann í 19 ár hevði spælt við á besta liðnum hjá StÍF, roknaði hann tó við, at talan fór at gerast um eina lættari uppgávu, nú hann skuldi standa uttanfyri, men so er kortini ikki, heldur hann.

- Eg helt so avgjørt, at hetta fór at verða munandi lættari, men tvørtur ímóti. Tað er nógv strævnari í sín hátt, tí tá tú ert á vøllinum, so fært tú um ikki avreagerað, tá alt ikki gongst eftir vild.

## Frið á

Sum hjálparvenjari hevur hann ofta til uppgávu at vera eitt slag av stuðli hjá leikarunum, men hóast hann tykist hava røkt hesa uppgávu væl, so dugir hann ikki at siga, akkurát hvussu hann hevur gjørt hetta.

- Hesa vikuna havi eg verið sera upptikin av arbeiði, so eg havi mest sum slettis ikki verið við í fyrireikingunum, men undan dystinum royndi eg tó at fáa nervarnar hjá monnunum burtur. Bað teir ansa eftir, at ferðin ikki gjørdist so stór, at vit ikki kundu fylgja við sjálvir. Í mínari verð er tað betri at verða dømdur fyri nøl, heldur enn at skjóta upp á ein 70% møguleika. Tað ræður um at halda høvdið kalt, og tað gjørdi vit eisini í dag, segði Sveinbjørn at enda, meðan heiðursmerki um hálsin minti hann á enn ein steypsigur.



*- Tað er nógv strævnari í sín hátt, tí tá tú ert á vøllinum, so fært tú um ikki avreagerað, tá alt ikki gongst eftir vild, sigur Sveinbjørn um nýggja leiklutin*